## ETA-leiðari tikin

Fyri átta døgum síðani tók spanska løgreglan ein av leiðarunum í baskiska loysingarfelagsskapinum ETA, og í gjár visti BBC at siga, at Jurdan Mrtitegi Lizaso, sum verður hildin at vera ovasti leiðari í ETA, varð handtikin um vikuskiftið. Sambært BBC bleiv hann tikin einastaðni í útsynningspartinum av Fraklandi. Sagt verður, at tveir ETA-limir vóru saman við honum, og at teir blivu eisini tiknir. Sponsku myndugleikarnir leggja ETA undir at hava beint fyri meiri enn 800 fólkum tey seinastu 40 árini.



## Danmark fer á ráðstevnu

Danmark fer at taka lut á ST-ráðstevnuni um rasismu. Ivi hevur verið um donsku løttøkuna, eftir at tey fýra ES-londini Svøríki, Týskland, Italia og Niðurlond boðaðu frá, at tey fara ikki at senda umboð til Geneve. Londini bera ótta fyri, at tey muslimsku londini sklu fáa undirtøku fyri at banna atfinningum at átrúnaði. Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, sigur við DR, at koma ráðstevnulondini til nakra niðurstøðu, sum eitt nú skerjir talifrælsið, fer danska umboðanin til hús. USA og Avstralia hava boðað frá, at tey fara ikki at senda umboð á ráðstevnuna.

# John Johannessen forfylgdur í Løgtinginum

**- Eg og aðrir politikarar í Javnaðarflokkinum eru offur fyri eini persónsforfylging, men tað rørir meg ikki og eg haldi, at tinglimir skuldu hugsa meiri um at viðgerða álvarsligu trupulleikarnar í samfelagnum, heldur enn at karaktermyrða meg og onnur javnaðarfólk, sigur John Johannessen**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er komin eitt nýtt slag av yvirstætt í Løgtinginum við Kára á Rógvi og øðrum tinglimum, sum halda seg vera hevjað upp øll onnur og upp um allan kritikk og sum ikki fýra fyri at forfylgja, niðurgera og karaktermyrða øll, sum ikki hava somu uppfatan av veruleikanum, sum tey sjálvi, harímillum meg og aðrar politikarar hjá Javnaðarflokkinum.

- Men fólk í umsitingini hjá løgtinginum hava sanniliga eisini kent hesa forfylging á egnan kropp og beint nú eri tað eg, sum eri offur fyri hesi persónsforfylging.

Tað staðfestir John Johannessen, formaður fyri Javnaðarflokkin á tingi og politiskur formaður í Javnaðarflokkinum.

John Johannessen leggur afturat, at hetta rørir hann ikki, tí hann tekur tað ikki fyri meri enn tað er.

Hinvegin heldur hann, at hesir tinglimir skuldu hugsa meiri um at viðgera álvarsligu trupulleikarnar í samfelagnum, heldur enn at karaktermyrða meg og onnur javnaðarfólk, sigur John Johannessen

Hann er komin í brennidepilin eftir ein útsøgn í Løgtinginum um, at tað ber ikki til at samstarva við Kára á Rógvi, tingmann fyri Sjálvstýrisflokkin.

Tað fekk Sjálvstýrisflokkin at senda Javnaðarflokkinum opið bræv, har kravt verður, at flokkurin boðar frá, um hann stendur aftanfyri útsøgnina hjá John Johannessen.

John Johannessen sigur, at tað hevur hann ongar viðmerkingar til, tí hann vil heldur brúka orkuna upp á at viðgera tey veruligi politiski stórmálini, ið eru fyri framman, heldur enn at viðgera persónsmál.

Men hann staðfestir, at hann stendur við hvørt orð, tí hansara egnu royndir eru, at tað ber rætt og slætt ikki til at samstarva við Kára á Rógvi.

Og hann veit einki annað enn at Javnaðarflokkurin er púra samdur við honum.

Hinvegin skilir hann ikki, hví hetta er blivið ein gølukend søga í fjølmiðlunum.

- Kári á Rógvi er ein av teimum, sum ikki fýra fyri at karaktermyrða meg og onnur javnaðarfólk, uttan sjálvir at tola, tað allar minsta av atfinningum, uttan at kæra í eyst og vest.

Men John Johannessen heldur, at hetta hevur so lítið upp á seg, at hann tímir ikki at brúka meiri tíð upp á hetta. Tí hevur hann heldur ikki hug til at fara í smálutir og nevna dømi um, hvussu ringur tingmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum er at samstarva við.

- Eg havi betri hug at viðgera, hvussu vit leggja alla orku í, at varðveita og tryggja tryggleikan hjá hvørjum einstakum borgara í samfelagnum, nú búskaparkreppan herjar, heldur enn at brúka alla orku uppá at viðgera hvønn annan persónliga. Hetta er ein skeiv gongd, ið helst ber boð um politiska avmakt.

- Samfelagið kemur ikki víðari, fyrr enn tinglimir fara at brúka orkuna uppá politikk, heldur enn at forklaga hvønn annan við tápuligum grundgevingum.

- Tað er nakað sum meira hoyrir heima ímillum pedagogar og barnagarðsbørn, sigur John Johannessen.

### Kennir seg ikki aftur

Kári á Rógvi hevur ikki hug at gera so nógv meiri burtur úr hesum.



*- Hetta er ein roynd av forfylgja, karaktermyrða og niðurgera meg og onnur javnaðarfólk, sigur John Johannessen. Kári á Rógvi kennur seg ikki aftur í kritikkinum hjá John Johannessen*

Men hann sigur, at hann kennir seg als ikki aftur í kritikkinum hjá John Johannessen.

- Eg havi nógv samstarv ymsar vegir, eisini við javnaðarfólk og mær vitandi eru ongir trupulleikar av tí

Hann sigur, at hann verður dag og dagliga boðin við í samstørv av øllum handa slagi og hann heldur ikki at tað týðir upp á, at hann er ikki grannhavandi nakrastaðni.

## Ítróttardagur fýri sálarliga veik og starvsfólk

**Stuðulstænastan hjá Nærverkinum og Sinnisbati fara nú at halda ítróttardag í Leirvík**

ÍTRÓTTARDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ítróttardagurin, sum verður á ítróttarøkinum í Leirvík fríggjadagin 15. maj 2009 frá klokkan 8.30 til 16, er ætlaður fólkum við avmarkaðum sálarligum førleika og starvsfólkum, ið arbeiða á hesum øki.

Brúkarar og starvsfólk luttaka á jøvnum føti í teimum ymisku ítróttargreinunum og endamálið við er fyrst og fremst at hava tað stuttligt saman, at røra seg og ikki minst, at knýta samband ímillum tey luttakandi.

Men er tað onkur, sum ikki kann, ella vil vera við í sjálvum kappingunum, eru tey tó vælkomin við sum fjeppari.

Kappast verður í fótbólti og boccia fyrrapartin og stafettrenning og rundbólti seinnapartin.

Hvør íðkadi kann vera við í tveimum ítróttargreinum, einari fyrrapart og einari seinnapart og tá kappingarnar eru lidnar, verða heiðursmerki latin vinnandi liðunum og einstaklingunum.

Luttøkugjaldið er 150 krónur og tá er morgunmatur, frukt, kaffi, te, kakur og borðhald við í prísinum.

Boðast skal frá luttøku í seinasta lagi hósdagin 7. maj á tlefonnummari 76 43 01 ella 76 43 02 ella við at senda teldubræv til: annikah@naerverk.fo.

# Hava klipt í nógv koyrikort

**Hesa vikuna hevur løgreglan kannað nógvar bilførarar rundan um skúlar og barnagarðar og tað hevur kostað nógvum klipp í koyrikortið**

FERÐSLUKANNINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur løgreglan gjørt eitt átak fyri at kanna ferðsluna.

Hesuferð gjørdi løgreglan tað, at tey fóru runt á skúlar og barnagarðar áðrenn klokkan átta á morgni at kanna støðuna hjá teimum, sum komu at seta børn av rundan um barnagarðarnar ella skúlarnar.

Og hetta hevur kostað nógvum eitt klipp í koyrikortið.

Og trupulleikin er hin sami afturvendandi og hann er, at fólk gloyma at brúka trygdarbeltið.

Annars vóru onkur dømi um, at bilførarar tosaðu í fartelefon ímeðan teir koyrdu, ella høvdu onki koyrikort uppi á sær.

Yvirhøvur eru tað foreldur, sum ikki spenna børnini í trygdarbeltið, men sjálvir eru bilførararnir heldur ikki nóg raskir til at spenna teirra egna belti.

Tilsamans hava einir 14-15 bilførarar fingið klipp í koyrikortið fyri ikki at brúka trygdarbeltið.

Serliga nógv vórðu tikin í Vestmanna, har løgreglan klipti koyrikortið hjá átta bilførarum fyri ikki at brúka trygdarbelti og ein stórur partur av teimum vóru børn, sum ikki sótu fastspent.

Fær bilførari trý klipp í koyrikortið, skal hann upp til nýggja koyriroynd og stendur hann ikki royndina, missur hann koyrikortið.



*Hesa vikuna hevur løgreglan kannað bilførarar, sum komu at seta børn av við skúlar og barnagarðar og enn einaferð mátti staðfestast, at foreldur eru ikki serliga røsk at spenna børnini í trygdarbeltið*